NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føðingar

18. juni fingu Dorte Krahl og Høgni Dalsgaard, Keypmannahavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

18. juni fingu Johanne Amanda, 5 ár, og Samuel Peter, 2 ár, ein beiggja. Hann var 52 cm langur og vigaði 3200 gr. Foreldur teirra eru Elisabeth og Flemming Abrahamsen, Ålborg.

21. juni fingu Mirjam og Eli Joensen, Århus, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4300 gr.

22. juni fingu Margret og Jóhan David Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3600 gr.

23. juni fingu Diana á Skúr og Aref T. Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3265 gr.

Brúdleyp

Í dag, 28. juni, kl. 14.00 giftast í Ebenezer, Anna Maria av Reyni og Heini Ellingsgaard, bæði úr Tórshavn.

Veitslan verður fyri innbodnum kl. 18.30 í Pállstovu.

Í dag, 28. juni, giftast í Prestagarðinum á Ziskatrøð Annika Vilhelm, Kunoy og Tummas Andreassen, Viðareiði.

Opið hús verður í heimi teirra í Kunoy frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin

Í dag giftast í Nes kirkju, Joan Hansen, Nes og Jan Skoralíð, Leirvík.

Veitslan verður fyri innbodnum á Muntra.

Í dag, 28. juni, kl. 15.00 giftast í Fløng kirkju, Tórun Poulsen, Skipanes og Thomas Juul Andersen, Hedehusene.

Veitslan verður fyri innbodnum á Stationsvej 18, 2640 Hedehusene.

Í dag, 28. juni, kl. 15.30 giftast í Bangsbo Strand kirkju í Frederikshavn, Carina Johansen, Trongisvágur og Per Mortensen, av Skælingi.

Brúdleypsadr.: Kalkværksvej 27, 9900 Frederikshavn.

Í dag, 28. juni, verða Barbara Olsen og Pætur S. Rasmussen vígd í býráðshúsinum í Havn.

Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, eru vælkomin í heimið hjá Gladys og Per Olsen, Børkugøta 9, 100 Tórshavn. Opið hús millum kl. 15.00-20.00.

Petur Even Djurhuus norskur konsul

Tann 16. juni var Petur Even Djurhuus í Havn útnevndur norskur konsul í Føroyum.

Petur Even er sonur Bysse og Tórmóð Djurhuus í Hoydølum. Hann er útbúgvin løgfrøðingur frá Universitetinum í Keypmannahavn í 1988 og starvast hjá Advokatfelagnum yvir við Strond í Havn.

Umframt advokatvirki sítt, so er Petur Even eitt nú nevndarlimur í Atlantic Petroleum og í Føroya Fiskavirking. Síðani 1998 hevur hann verið parnari í Advokatfelagnum yvir við Strond.

Saaby Manhertha Andreasen 85 ár

07.07.18 er Manhertha, vanliga nevnd Hertha borin í heim á Trøðni í Fuglafirði. Foreldur hennara vóru Anna og Albert Eldevig og kann hon henda dag hátíðarhalda sín 85 ára føðingardag.

Ein høgur aldur – ella hvat?

Men Hertha kann í hvussu er fegnast og vera stolt yvir sítt verk sum mamma, omma, langomma og olduromma.

Henda mynd vísir týðiliga hennara stoltleika yvir lítla Tór, ið er fjórseinata skot á stammuni.

Skotini hava verið nógv, summi eru sprottin, nøkur standa í blóma og onnur eru við at falma.

Eg vil sum yngsta dóttir hennara geva Herthu allan heiðor og virðing fyri hennara stórsligna verk sum mamma. Hertha hevur klára og megna meir enn flest onnur menniskju hava uppliva ella kunna ímynda sær.

Hennara kor hava ikki altíð verið lætt, hóast tað, hevur hon havt eginleika at geva familju síni eina barlast til orræði og stoltleika, har tey kunnu heinta megi og kraft at yvirliva tá ið trupulleikar valda.

Tí hevur tú mamma uppiborið at fáa lov at hvíla, at fáa lov til ikki at hava meir at hugsa um ella hava umsorgan fyri, tí vóni eg at tú hevur góð fólk kring teg, ið passa og uppvarta teg, so dagligdagur tín gerst lættur og gevandi.

Hjartaliga tillukku við degnum mamma.

Anna

Ingolf Olsen 60 ár



Mikudagin 25. juni fylti kendi danski gittarleikarin og sangarin Ingolf Olsen 60 ár. Ingolf er hálvur føroyingur. Mamma hansara, Kristianna, var úr Leynum, dóttir Martinus í Leynum. Hon fór niður til Danmarkar miðsskeiðis í tríatiárunum, giftist og búsettis í Blågårdsgade á Nørrebro í Keypmannahavn. Hon og maðurin, Axel, fingu synirnar Ingolf og Robert.

Ingolf hevur rættuliga gjørt vart við seg í Danmark, fyrst og fremst tí at hann gjørdi tað ógjørliga at spæla inn nakað so ómodernað sum sálmar hjá Brorson og Kingo. Hetta gav honum tó eitt nærmast fólksligt gjøgnumbrot.

Ingolf er gittarleikari, hann spælir lutt, syngur, er dosentur – og urgubyggjari.

Hann var í læru hjá Frobenius & Co frá 1960. Men gittarin hevði tokka hansara. Hann fór til Onglands at lesa hjá heimsgitna Julian Bream. Og sum 20 ára gamal fór hann undir umfatandi solistvirksemi, sum fekk hann til París, har hann í 1966 fekk eina stóra virðisløn í Concour Internationale.

Samstundis menti hann hina stóru síðuna av talenti sínum. Hann debuteraði sum sangari. Ingolf hevur eina serliga røddi, sum eisini týðum er at hoyra í bæði í Danmarks Radio og í Útvarpi Føroya, ikki minst tá Janus velur løgini.

Berlingarin skrivaði týsdagin, at røddin hjá Ingolfi er serlig – bæði høg og djúp, nátúrlig og affekterað. Eitt avbera gott amboð til tey bæði tingini, hann hevur áhuga fyri: Tónleikinum frá miðøldini, renesansuni og barokkinum, og tónleikinum úr 20. øld. Fakttiskt var tað í einum verki hjá Antonio Bibalo, hann í sínari tíð trein fram á ti Jydsku Operaini.

Tá var hann partur av navnframa ensamblenum, Prisma, hjá Tamás Vetős, og frá 1967 í Trio Mobile, saman við Mogens Ellegård og Bent Lylloff. Saman við Toke Lund Christiansen og henrik Olsen tók hann eisini stig til stovnanina av Det Musikalske Triumvirat, og hevur annars havt hundratals konsertir av øllum handa slag.

Harumframt hevur Ingolf spælt inn nógvar plátur – m. a. við tónleiki hjá Bellman, Laub og Carl Nielsen, umframt tær við Brorson og Kingo. Eisini var hann limur í teirri nevndini, ið hevur staðið fyri nýggju donsku sálmabókini, sum fyri fáum døgum síðani varð tikin í nýtslu.

Ingolf Olsen hevur síðani 1970 undirvíst við konservatoriið í Keypmannahavn. Nú hann er vorðin seksti, gevst hann, og tað fer óivað at geva honum meiri tíð at syngja og spæla – og kanska vit aftur síggja hann á konsertferð í Føroyum…

Sámal Jacobsen 40 ár

Sunnudagin 29. juni fyllir Sámal Jacobsen á Argjum 40 ár. Sámal er føddur og uppvaksin í Havn, sonur Beintu, f. Háberg, og Eiler Jacobsen í Havn. Hann er útbúgvin skipari og siglir við skipum hjá pápa sínum. Hann hevur siglt sum stýrimaður og skipari á Sólborg og siglir í dag sum skipari á Krúnborg. Sámal er giftur við Henriettu, f. Heinadóttir Heinesen, dóttir Mariu, f. Højsted, og Heina Heinesen á Argjum. Saman reka tey eisini sólmiðstøðina Sólborg á Argjum. Sámal verður burturstaddur føðingardagin.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Rosmunda Joensen 70 ár

Mikudagin 25. juni fylti Rosmunda Joensen í Fuglafirði 70 ár. Rosmunda er fødd og uppvaksin í Fuglafirði, hon er nummar trý í røðini av teimum átta børnunum hjá Andreu, f. Danielsen, og Christian Sofus Eldevig í Fuglafirði. Hon giftist í 1951 við Jacob Oluf Joensen úr Fuglafirði, sonur Hannu, f. Jacobsen, og Andreas Joensen í Fuglafirði. Tey giftust inn til foreldrini hjá Jacob Olufi. Rosmunda og Jacob Oluf eiga fýra børn, tey eru: Hanna, Ann-Elisabeth, Sonja og Andras, ið eru tvíburar.

Tá børnini vóru smá, og Jacob Oluf sigldi, hevði hon til arbeiði at gera trol fyri Trolvirkið í Fuglafirði, hetta arbeiðið gjørdi hon heima, meðan hon passaði børnini. Miðskeiðis í 60-unum fekk Jacob Oluf starv sum umsjónarmaður á Havsbrún, hetta starv røkti hann í 35 ár. Rosmunda og Jacob Oluf hava altíð staðið væl saman. Tá hann arbeiddi á Havsbrún, var telefonin vanliga stilla heim til teirra eftir arbeiðstíð, og Rosmunda avgreiddi ofta samtalurnar við skipini, sum skuldu inn á Fuglafjørð at landa. Rosmunda hevði í nógv ár handilin »Aldan«, ið m.a. seldi útgerð til skip, saman við beiggja sínum Sigurðjón, sum annars fylti 60 ár, sama dag sum Rosmunda fylti 70. Hann býr í Grønlandi í dag. Tá tey góvust við handlinum, fór Rosmunda at arbeiða á flakavirkinum í Fuglafirði, har hon var arbeiðsformaður í fleiri ár. Seinni arbeiddi hon nøkur ár á Toystovuni í Fuglafirði. Sum yngri vóru Rosmunda og Jacob Oluf virkin í ítróttarfelagnum ÍF, har tey t.d. syrgdu fyri útlendsku spælarunum, sum komu til bygdina. Rosmunda er virkin limur í pensionistafelagnum í Fuglafirði, har hon eisini situr í nevndini. Saman við manninum ferðast hon nógv uttanlanda. Annars nýtur hon sína tíð til at seyma, binda og brodera, hon ger eisini ymiskt til føroysk klæðir. Hon eigur 6 ommubørn og 3 langommubørn.

Óli Simonsen 65 ár



Mánadagin 30. juni fyllir Óli Simonsen í Saltangará 65 ár. Hann er sonur Jóhan Esbern Simonsen úr Saltangará og Karolinu, f. Petersen, av Selatrað.

Óli tók læraraprógv í Havn í 1962, var lærari í Runavík í 3 ár, í Keypmannahavn í 2 ár, aftur í Runavík í 5 ár, í Kalundborg í 2 ár og í Fuglafirði í 5 ár.

Í 1980 tók hann aftur við starvi sum lærari í Runavík, og nú fór hann inn á ta leið, sum hann síðani hevur gingið: at arbeiða við menningartarnaðum. Í 5 ár var hann lærari í Runavík, partvíst sum sjónráðgevari. 1985-88 starvaðist hann í Lítla Skúla í Runavík, sum er skúli fyri menningartarnað. Síðani 1988 hevur hann verið serlærari í Eysturoynni og sjónráðgevari fyri Føroyar.

Frá 1965-67 var Óli á skeiði á Danmarks Lærerhøjskole í søgu, støddfrøði og føroyskum. Hann var aftur á skeiði í 1973-74 í ráðgeving í at undirvísa sjónbrekaðum. 1984-86 var hann á skeiði fyri serlærarar, sum Danmarks Lærerhøjskole skipaði fyri í Føroyum.

Óli Simonsen er giftur við Mourentsu Petersen úr Fuglafirði, børn teirra eru: Lena, Hilmar, Ester og Tóra.

Ólavur Olsen 80 ár



20. juni fylti Ólavur Olsen í Havn 80 ár. Ólavur er fuglfirðingur, sonur Onnu Kathrinu, f. Haraldsen, úr Elduvík, og Jóhan Hendrik Olsen, vanliga nevndur Hendrik á Bug, ættaður úr Gøtugjógv. Sum ungur kom Ólavur til Havnar at ganga í skúla, síðan fór hann til Danmarkar, har hann gekk á hægri handilsskúla. Heim aftur komin fekk hann skrivstovustarv í Fuglafirði. Í 1949 giftist hann við Odu, f. Gaard Hansen, úr Havn, dóttir Andreu, f. Gaard, ættað úr Fámjin, og Óla Jákup Hansen, úr Horni í Havn. Oda og Ólavur búsettust í Fuglafirði og fingu tríggjar synir, Hera, Ova og Kára. Í 1957 flutti familjan til Havnar at búgva, tey keyptu eini raðhús í J.Paturssonargøtu. Síðan 1972 hava tey búð í Grønulíð í Havn. Ólavur arbeiddi eina tíð hjá grannskoðarunum Jógvan Sundstein og Paula Ellefsen. Seinni fekk hann starv sum landsgrannskoðari. Hetta starv røkti hann, til hann legði frá sær fyri aldur, 67 ára gamal. Sum pensionistur fær Ólavur tíðina at ganga við at passa hús og hava og svimja. Hann er altíð hjá, tá Havnar Hornorkestur spælir. Ólavur spældi sjálvur sum ungur í Fuglafjarðar Hornorkestri, sum trummusláari. Allir tríggir synirnir spæla í Havnar Hornorkestri. Óla Jákup Hansen, verfaðirin, var ein av stovnarunum av Havnar Hornorkestri og spældi har. So hesin áhugin at spæla horn hjá yngru ættarliðunum kemur helst frá báðum familjunum.

Uni Danielsen grikskur konsul

Fyrr í vikuni var Uni Danielsen á grisku sendistovuni í Keypmannahavn, har hann formliga tók við starvinum sum grikskur konsul í Føroyum.

Hann tekur við eftir pápa sín, Birgir Danielsen, sum doyði fyri knøppum tveimum árum síðani.

Uni Danielsen er stjóri á Flogfelag Føroya.

Minningarorð

Synnøve Justinussen

Streymnes

f. 14.01.1976 - d. 24.03.2003

Øll fáa vit okkara ásettu tíð á fold, summi longri, og onnur styttri. Hetta seinra fekk mín góða vinkona Synnøve.

Sjálvt um tað ikki er so lætt at festa nøkur orð á blað so fari eg at royna kortini.

Vit komu at kennast sum smágentur í Árnafirði, og hava alla tíðina síðani havt samband okkara millum.

Hon gekk eitt tíðarskeið á Húsarhaldsskúla í Klaksvík, og flutti seinni norður higar, saman við systir síni, at búgva. Eisini hevði hon arbeiði her norði, so tá vóru túrarnir nógvir í tali á gátt á Stoksoyrvegnum, og nógv komu á gátt hjá teimum báðum systrunum, og øll kendu seg sum heima. Tað vóru minnisríkar løtur, sum ongantíð verða gloymdar.

Synnøve flutti so til Havnar at búgva og hevði vaskiarbeiði, og seinni fekk hon starv á fiskavirkið sum eftirlitsfólk. Øll sum hon arbeiddu saman við, hildu nógv av henni. Hon var trúføst og gjørdi sítt arbeiði til fulnar.

Fyri nøkrum árum síðani fekk hon boð frá læknum at lív hennara fór at broytast, og gjørdust túrarnir fleiri í tali niður til Danmarkar á sjúkrahús. Kortini var hon altíð tann sama, altíð í góðum lag. Altíð við einum smíli, altíð positiv og smílandi .

Eg minnist, hvussu glað hon var, tá ið eg spurdi hana, um hon vildi verða gumma at dóttir mínari Bjørt.

Ikki visti eg tá, at hon skuldi burtur her av foldum bert góðan mánað seinni.

Vit fingu eitt stutt tíðarskeið saman við henni, men eitt gott og minningarríkt tíðarskeið, sum altíð vil liva í minninum.

Synnøve helt nógv av sínari familju, og vinum. Hvørja ferð hon var niðri á sjúkrahúsi, var Maud systir hennara við henni, og so var eisini tann síðsta túrin, tá eisini onnur vóru við teimum .

Tað vóru nógv sum komu at siga Synnøve eitt síðsta farvæl og fylgdu henni til síðsta hvíldarstaðin her á fold.

Góðu tit, Stefani, Jógvan, Maud, Ólavur, Joan, og Ásbjørn.

Gud styrki tykkum, og okkum øll.

Æra veri minnið um vinkonu mína Synnøve.

Vinkona tín Erna

Andlát

20.06
Esther Hvíthamar, Havn, ættað úr Sumba, 67 ár

23.06
Tummas Juul Joensen, Havn, ættaður úr Nólsoy, 83 ár

24.06
Lina Justinussen, Leirvík, ættað úr Fuglafirði, 91 ár

Dagurin

28. juni. Eleonora. Nú á døgum stendur í álmanakkanum bara Karolina Amalia, sum er navnið á eini drotning, og sum er komið inn í álmanakkan, eftir at teir í 17. øld gjørdu av at seta føðingardagarnar kongum og drotningum við dagarnar í álmanakkanum. Men henda Karolina Amalia er eingin halgikona heldur enn onnur konglig. Fyrr stóð navnið Eleonora, men satt at siga vita vit einki um, hvør ið hon var. Navnið er tað sama sum Helena.

29. juni. Pætursøka. Tíðliga í fornkirkjuni varð 29. juni hildin til minnis um, at bæði Pætur og Paulus vórðu tiknir av døgum henda dag, Pætur krossfestur við høvdinum niðureftir helst í 64, og Paulus hálshøgdur helst í 67. Dagurin var so upprunaliga bæði ein pætursøka og ein pálsmessa. Men seinni varð avgjørt, at so mætir menn áttu at havt hvør sín minnisdag, og Paulus fekk dagin eftir, 30. juni, sum sín halgidag, og 29. juni er so bara pætursøka.

30. juni. Lucina, deyð umleið ár 100. Kristin kona, sum sigst at hava verið uppalærd av ápostlunum sjálvum. Annars var dagurin, sum nevnt omanfyri, eisini ein pálsmessa.